# Ozonlagið kann verjast betur

**Seinastu tølini vísa, at Føroyar framvegis flyta lutfalsliga stórar mongdir av ozonoyðarum inn. Tað kemst yvirhøvur av, at nýggjar reglur mangla**

Í 1997 tóku Føroyar undir við Montreal-protokollini. Tað er ein avtala um at minka útlátið av evnum, ið oyðileggja ozonlagið.

Umhvørvisstovan skrivar, at Montreal-protokollin, sum varð samtykt fyri júst 20 árum síðan, á mangan hátt hevur verið ein sólskinssøga. Nærum øll heimsins lond – 191 tilsamans – hava bundið seg til protokollina, og tað hevur eydnast at minka útlátini av ozonoyðandi evnum næstan 95 prosent, síðan protokollin varð samtykt. Ozonlagið verjur okkum fyri skaðiligari geisling frá sólini og fyribyrgir sjúkum sum húðkrabba og eygnasjúkum. Heimsheilsustovnurin WHO hevur mett, at Montreal-protokollin fram til 2050 hevur vart fyri 20 milliónum tilburðum av krabba og 130 milliónum tilburðum av eygnasjúkum.

Hóast Føroyar eru millum londini, ið hava bundið seg til Montreal-protokollina, kunnu vit ikki erpa okkum av at hava gjørt nóg mikið til at minka um útlátið av ozonoyðandi evnum. Nakað er tó gjørt, og fyrsta stigið var at fáa skrásett hvussu stór nýtslan er.

Fyrstu tølini eru frá 2003. Tá var útlátið umleið 2,3 sokallað ODP tons. Meginparturin av evnunum er kølievni. Seinastu tølini vísa, at útlátið í fjør var minkað niður í 1,9 ODP tons. Tað er framvegis er eitt sera stórt tal, sammett við eitt nú Danmark og Norra.



### Køliskipanir á skipum

Størsta nýtslan av ozonoyðarum hjá okkum er evnið HCFC-22, eisini nevnt R-22. Tað verður fyri stóran part verður brúkt sum kølievni til køliskipanir umborð á skipum. Seinastu tølini fyri hesa nýtslu vísa, at tað framvegis verða fluttar størri nøgdir av ozonoyðandi kølievnum inn, enn tað átti at verið samanborið við talið á skipum við køliskipanum. Hetta kemst lutvíst av, at fleiri skip hava eldri og skeivar R-22-skipanir. Tað ber í sær, at kølievnið lekur út, og tískil er við til at oyða ozonlagið. Ein onnur grund til, at vit flyta størri mongdir av ozonskaðiligum evnum inn enn okkum tørvar, er, at evnini eisini verða seld útlendskum skipum.

Føroyar hava við Montreal-protokollini bundið seg til at minka nýtsluna og so líðandi skifta skaðiligu evnini út við evnir, ið ikki skaða ozonlagið, at skráseta allan innflutning, útflutning og nýtslu av evnunum og til ikki at selja slík evni til lond, ið ikki eru partur av sáttmálanum.

Í september í fjør var verkstova, har vinnan og Umhvørvisstovan hittust at kjakast um, hvussu skipini, ið eru atvoldin til megin-partin av útlátinum, kunnu minka nýtsluna, til dømis við at leggja um til umhvørvisvinaligari tøkni.

# Nógvar túsund at spara

*Í Føroyum brúka vit í dag umleið 60.000 tons av olju til upphiting. Við skilagóðari stýring ber til at minka heilt munandi um hesa oljunýtslu*

**Spara túsundavís av krónum og oljulitrum við alternativari hitaskipan til sethúsini. Jarðfeingið hevur kannað fleiri møguleikar**



Tað er upp til hvønn einstakan okkara at minka um $CO_2$ útlátið. Tíbetur loysir tað seg eisini ofta fíggjarliga at hugsa um umhvørvið. Jarðfeingi hevur kannað royndirnar hjá húsaeigarum við varmapumpum og sólfangarum.

### Bjálving

Okkara royndir vísa, at oljunýtslan í sethúsum vanliga er 15 til 20 litrar av olju um árið fyri hvønn fermetur av búðareali.

Hetta er sera høgt tal og vísir, at føroysk sethús sum heild eru illa bjálvaði.

Í nógvum førum ber til at minka oljunýtsluna niður í eina helvt (á leið 10 litrar/m2/ár) við bjálving.

Ein íløga í bjálving vil eisini skerja $CO_2$ útlátið. Um oljunýtslan fer niður í eina helvt, minkar $CO_2$ útlátið við 3 til 4 tonsum um árið í vanligum sethúsi.

Útreiðslan til bjálving er sjálvandi tengd at standinum á húsunum, men tað er sannlíkt, at ein íløga í bjálving kann vinnast inn aftur í einum tíðarskeiði, sum er stytri enn 15 ár.

### Sólfangarar

Royndir í Føroyum gjøgnum fleiri ár vísa, at hvør fermetur av sólfangara sparir húsarhaldinum umleið 50 litrar av olju um árið.

Ein vanlig sólfangaraskipan, sum er 10 m2, vil skerja $CO_2$ útlátið við 1,5 tonsi um árið.

Íløgan í slíka skipan er umleið 60.000 kr. Við núverandi oljuprísum sparir húsarhaldið 3.500 krónur um árið. Íløgan í sólfangaraskipanina kann tí vinnast inn aftur eftir umleið 20 árum.

### Varmapumpur

Ein varmapumpa ger oljunýtsluna í húsunum minni, men elnýtsluna størri, og tí eisini oljunýtlsuna hjá SEV størri. Tølini eru neyvt tengt at, hvussu væl varmapumpan virkar, eisini nevnt COP. COP er lutfallið millum framleidda varmaorku og tilførda elorku.

Um COP er størri enn 2, fremur varmapumpan niðurskurð í $CO_2$ útlátinum, sjálvt um øll elorkan verður framleidd við tungolju frá SEV.

Jú størri COP er, jú betri loysir íløgan seg fíggjarliga.

### Luft-luft varmapumpa

Luft til luft varmapumpur verða av nógvum nýttar sum ískoyti til sentralvarma.

Hesar hava eitt høgt COP (umleið 4), og íløgan er avmarkað. Fyrimunirnir eru tí, at íløgan er skjótt vunnin aftur (umleið 6 ár), og at $CO_2$ útlátið fyri framleidda varman verður skorið við 40 %.

Vansar kunnu vera, at pumpan bara gevur varma til einstøk rúm, og at livitíðin er avmarkað til eini 10 ár.

### Luft-vatn varmapumpa

Hesar varmapumpur verða nýttar ístaðin fyri oljufýr og eru vorðnar alsamt vanligari í verandi og eisini nýggjum sethúsum.

Í mun til skipan við oljufýri er íløgan umleið 60.000 kr. hægri. COP liggur vanliga millum 2 og 3, alt eftir slag av varmaskipan (radiatorar/gólvvarmi) og nýtslumynstri.

Eisini hesar varmapumpur minka um $CO_2$ útlátið. Afturgjaldstíðin við verandi orkuprísum er 15 til 20 ár.

Aðrar varmapumpuloysnir sum vatn til vatn og jørð(berg) til vatn eru enn lítið royndar í Føroyum. Felags fyri tær eru, at tær eru dýrari at seta upp, men hava longri livitíð og síggjast og hoyrast minni í nærumhvørvinum.

Samanumtikið kann sigast, at omanfyri nevndu tiltøk í sethúsum øll geva minkandi oljunýtslu og harvið minkandi $CO_2$ útlát. Samstundis kann sigast, at íløgurnar hava heldur langa afturgjaldstíð.

Um vit skulu gerast minni heft av innfluttari olju er týdningarmikið, at landsins myndugleikar gera skipanir, ið fremja umlegging til varandi orkukeldur.

Í Føroyum brúka vit í dag umleið 60.000 tons av olju til upphiting.

Við skilagóðari stýring ber til at minka heilt munandi um hesa oljunýtslu.